FAROE
LAW

Faroe Law bjóðar heimligar og altjóða loysnir

*Tosið við:*

**Eyðfinn Jacobsen**
**advokat**

**Jens Wang**
**advokat**

Tróndargøta 19
P.O.Box 158
FO-110 Tórshavn
tel 359 900 - fax 359 901
mobil 219 902 - 219 903
faroe-law@faroe-law.fo

www.faroe-law.fo

SEV

# Maskinmeistari

## søkist til Elfelagið SEV

Eitt starv sum maskinmeistari við elverkini í Suðuroy er leyst at søkja til setan frá umleið 1. mars 2007 ella skjótast gjørligt aftan á 1. mars 2007.

Talan er um avloysarastarv fyri maskinmeistara í farloyvi, og verður setanin tí tíðaravmarkað til eitt ár.

**Starvið:**
Maskinmeistaraarbeiðið umfatar rakstur og hald av elverkunum í Suðuroy, bæði sum dagarbeiði og sum vaktarbeiði uttanfyri vanliga arbeiðstíð. Vakthavandi maskinmeistari hevur yvirvaking av og lastfordeiling millum Vágsverkið og elverkið í Botni umframt netyvirvaking og koblingsleiðslu fyri elnetið í allari Suðuroynni.

**Elverkini í Suðuroy umfata í løtuni:**

- Elverkið í Vági við trimum dieselmotorum, tilsamans 9,7 MW.

  Hesir motorar eru riknir við tungolju

- Elverkið í Botni, sum er eitt vatnorkuverk við tveimum turbinum upp á tilsamans 3 MW
- Elverkið í Trongisvági, sum ikki koyrir dagliga, men er til at taka við einum dieselmotori upp á 2 MW.

Arbeiðsstaðið (uppmøtingarstaðið) er á Vágsverkinum, har vaktin hevur tilhald. Arbeitt verður á og út frá hesum arbeiðsstaðið til hini elverkini eftir tørvi, og fer flutningur vanliga fram við arbeiðsbili hjá SEV.

**Førleikakrøv:**
Kravt verður, at umsøkjararnir hava fulla maskinmeistaraútbúgving, t.v.s. víðkað maskinmeistaraprógv ella 3 ára maskinmeistaraskúlaprógv, ella í minsta lagi tvey ára maskinmeistaraútbúgving.

**Lønin:**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið.

Lønin verður ásett eftir útbúgving og starvsaldri innan maskinmeistarayrkið.

Umframt føstu lønina kann roknast við vaktargjøldum og møguliga av og á eisini úrtíðarløn.

**Umsóknir:**
Umsóknir skulu saman við prógvum og møguligum ummælum verða send Elfelagnum SEV, Postrúm 319, FO-110 Tórshavn og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi mánadagin, tann 26. februar 2007.

**Nærri upplýsingar:**
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Palla Mortensen, verksmeistara á elverkunum í Suðuroy ella til Berg Didriksen, deildarstjóra á Maskindeildini, báðir á telefon nr. 346800.



# Søkt verður eftir varaleiðara,

við maskinmeistara- ella elektrikaraútbúgving, til Lívfiskastøðina í Skopun

Av tí at støðleiðarin á Lívfiskastøðini í Skopun fer í farloyvi, søkja vit eftir varaleiðara til Lívfiskastøðina.

Uppgávan er fjølbroytt, og krevur góð evni sum handverkari, tøkniligt hegni og góð samstarvsevnir.

FØRLEIKI:
Vit kundu hugsað okkum, at varaleiðarin hevur førleikar sum maskinmeistari ella elektrikari.

ÁBYRGD:
Sum varaleiðari fært tú ábyrgdina av allari tekniskari útgerð á Lívfiskastøðini so sum:

- Pumpi- og filturskipanir í samband við inntøku av sjógvi
- Neyðstreymsveiting og el-skipan
- Fráboðanarskipanir í samband við trygd og góðskustýring
- Sløkkiútgerð og
- Viðlíkahald av bygningum og ognum felagsins annars

Arbeiðsstaðið verður á Lívfiskastøðini í Skopun, men umsøkjarin skal vera til reiðar at loysa uppgávur á øllum støðum hjá P/F Fiskaaling.

Vit kunnu bjóða eitt gott arbeiðspláss við góðum starvsfeløgum. Løn sambært avtalu.

Hevur tú spurningar, kanst tú seta teg í samband við Zacharias Zachariassen, telefon 21 35 94 ella Ingolf Joensen, telefon 21 47 47.

Send eina umsókn við persónligum upplýsingum, um útbúgvingar og starvsroyndir til Ingolf Joensen, stjóra, P/F Fiskaaling, við Áir, 430 Hvalvík, í seinasta lagi 19. februar 2007.

## P/F Fiskaaling

Fiskaaling er eitt partafelag og Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin. Høvuðsskrivstovan er við Áir, har felagið fremur kynbótaarbeiði og gransking. Umframt støðina við Áir og Lívfiskastøðina í Skopun, hevur felagið eina marina royndarstøð í Nesvík, eina sílastøð í Skálabotni, og eina alistøð í Heysti. Fiskaaling hevur drúgvar royndir við kynbótaarbeiði av laksi og sílum, og við kalvaaling. Harafturat hevur Fiskaaling verksett eina spennandi royndarverkætlan fyri toskaaling.

TEAM85

Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo

Internet

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Lesið Sosialin -tað loysir seg

# Fólk søkist

Vit søkja eftir einum álítandi og fyrikomandi starvsfelaga at arbeiða fyrra- og seinrapartar.

Áhugaði kunnu ringja á tlf 50 37 00

Shell støðin í Vestmanna